Beinir Johannesen
Magnus Rasmussen
Steffan Klein Poulsen
Bárður á Steig Nielsen
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
løgtingsmenn

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 96/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin) (Dagføring av gjøldum, veiðigjald fyri lodnu og heystgýtandi sild og strikan av undantaki fyri heimaflotan)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Frágreiðandi heitið verður orðað soleiðis: "(Dagføring av gjøldum fyri lodnu og heystgýtandi sild)

2. § 1, nr. 2 verður strikað.

   § 1, nr. 3 – 12 verða eftir hetta § 1, nr. 2 – 11.

Viðmerkingar:

Hóast tað í pørtum av fiskivinnuni hevur gingið væl seinastu árini, er ein partur av flotanum, ið hevur ligið í øgiliga tungum sjógvi sama tíðarskeið. Tað er heimaflotin. Tilfeingisgjald á hendan partin av flotanum rakar skeivt, og tí verður skotið upp at halda fast í verandi undantaki.

Til nr. 1 og 2

Sambært § 2, nr. 2 í galdandi løgtingslóg verður veiðigjald ikki rindað fyri kvotur, latnar fiskiførum á føroysku landleiðunum sambært §§ 18 og 19 í løgtingslóg um sjófeingi. Hetta sama er galdandi fyri fiskifør við fiskiloyvi til fiskiskap við gørnum eftir havtasku og svartkalva á føroysku landleiðunum.

Við hesum broytingaruppskoti verða nevndu undantøk fyri heimaflotan varðveitt. Frágreiðandi heitið í lógaruppskotinum verður broytt samsvarandi.

Á Løgtingi, 17. mai 2023

Beinir Johannesen Magnus Rasmussen

Steffan Klein Poulsen Bárður á Steig Nielsen Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur